## Skygni fullfuggjað um fýra ár

Gongst eftir ætlan verður bókarøðin »Skygni« fullfíggjað í 2011. - Tá kunnu allir flokkar í fólkaskúlanum, frá fyrsta til níggjunda, rokna á føroyskum undir savnandi heitinum Skygni, sigur Gundur Mortensen, ritstjóri, í tíðindaskrivi frá Føroya Skúlabókagrunni. Síðani 2004 hevur Gundur havt Skygnirøðina um hendi. Mortan Dalsgarð og Edvard Olsen hava týtt og tillagað tilfarið í bókunum, sum byggir á donsku røðina Sigma hjá forlagnum Malling Beck. Edward Fuglø hevur teknað. Í Skygnirøðini er føroyski gerandisdagurin grundstøðið, tá børnini skulu læra talfatan, talfimi og støddfrøðilig hugtøk. Fyrsta føroyska roknibókin kom í 1916.



## Hundaóskil á Hamrinum

Eitt ótal av klagum um hundaóskil hevur fingið Eigarafelagið á Hamrinum at senda skriv í hvørt hús í býarpartinum, har heitt verður á íbúgvarnir um at gera nakað við trupulleikan. Flestu klagurnar eru um leysgangandi hundar, sum felagið vísir á eru til ampa fyri bæði børn og foreldur. Eigarafelagið ger samstundis greitt, hvørjar fylgjur tað kann fáa, um áheitanin ikki verður fylgd. Føroya Landsstýri hevur gjørt kunngerð, sum áleggur hundaeigara at hava hundin í bandi. Sambært kunngerðini verður eigarin revsaður við bót, um kunngerðin ikki verður fylgd, skrivar Eigarafelagið á Hamrinum.

# Fiskivinnan í umhvørvislæru

**Føroya Ráfiskakeyparafelag skipaði mánadagin fyri temadegi um ávirkanina, sum veðurlagsbroytingarnar hava á framtíðar fiskiskap við Føroyar Serfrøðingar úr Noreg og Føroyum greiddu vinnufólki frá, at toskurin væntandi hvørvur, og CO2 útláti frá millum annað fiskivinnuni hevur skyldina**

UMHVØRVIÐ
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Norðuratlantshavið fer at hava heilt onnur fiskasløg, og føroyski landgrunnurin fer at hava nógv minni gróður og harvið minni fisk. Hetta eru framtíðarútlitini, sum havfrøðingar og havlívfrøðingar kundu geva føroysku fiskivinnuni grundað á tær veðurlagsbroytingar, sum eru hendar og fara at henda.

Endamálið við temadegnum var at fáa lýst tær broytingar, sum síggjast í havinum við og nærhendis Føroyar og Noregi og fáa ábendingar frá granskarum, hvussu tær væntandi kunnu ávirka fiskiskapin við Føroyar.

Til at lýsa hesi viðurskifti vóru serfrøðingar á økinum bjóðaðir at halda fyrilestrar. Bogi Hansen, havfrøðingur, Høgni H. Debes, havlívfrøðingur og Ole Arve Misund, granskingarleiðari frá Havforskningsinstituttet í Bergen greiddu reiðarum, fiskaseljarum og øðrum áhugaðum frá, hvussu støðan er í dag, og hvat væntandi fer at henda komandi árini.

Nógv fólk – ella nógvir menn – frá føroysku fiskivinnuni høvdu sett dagin av til at fáa nýggja vitan um umhvørvið og umhvørvisárinini á hav og fiskiskap. Meinhard Jacobsen, stjóri á Faroe Seafood, var stak væl nøgdur við ráðstevnuna.

- Tað var sera áhugavert at hoyra, hvat serfrøðingar meta fer at henda. Vit eiga at fyrireika okkum til alt, eisini at fiskastovnurin broytist fullkomiliga. Bogi Hansen legði dent á, at fiskivinnan hevði ábyrgd fyri einum triðingi av føroyska CO2 útlátinum. Hetta helt Meinhard Jacobsen eisini vera týdningarmikið at fáa framm.

- Men sjálvandi kann man ikki vænta, at ein einstakur vinnumaður fer at gera íløgur í meira umhvørvisvinarliga framleiðsluhættir, um hetta ikki loysir seg. Umhvørvisspurningurin er ein samfelagsspurningur og má viðgerast sum so, leggur Meinhard Jacobsen áherslu á.




*Bogi Hansen legði í sínum fyrilestri dent á, at granskarar í dag hava so holla vitan at byggja teirra metingar á, at teir kunnu gera rættiliga álitandi framrokningar. Og allar framrokningar vísa, at hitin fer at vaksa*



*Meinhard Jacobsen helt temadagin vera sera áhugaverdan. Tað hevur týdning fyri vinnuna at hava eitt so broytt vitanargrundarlag at byggja á sum møguligt, heldur hann*



*Nógv fólk vóru til fyrilestrarnar, sum Føroya Ráfiskakeyparafelag skipaði fyri. Og luttakarnir, sum Sosialurin prátaði við, vóru væl nøgdir. Fleiri bitu tó merki í, at serfrøðingarnir vóru varnir í sínum framrokningum*